UTTAN ÚR HEIMI

# Kring Jørðina í 80 tímar



*Virgin Atlantic Global/Flyer á royndarferð uppi yvir Nevadafjøllunum í USA*
*Mynd: Reuters*

**Amerikanski ríkmaðurin Steve Fossett ætlar sær at flúgva einsamallur kring Jørðina uttan at millumlenda og uttan at taka brennievni**

FLÚGVING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í morgin ella hósdagin fer tann 60 ára gamli millióningurin Steve Fossett á flog í flogfari sínum Virgin Atlantic Global/Flyer. Ferðin byrjar í amerikanska statinum Kansas, og leiðin gongur eystureftir.

Virgin Atlantic Global/Flyer kann flúgva 450 kilometrar um tíman. Flogfarið hevur 17 brennievnis-tangar, og veingjaspennið er 35 metrar. Meginpartin av ferðini skal tað flúgva í 52.000 fóta hædd.

Gongst sum ætlað, verður Steve Fossett tann fyrsti, sum hevur flogið einsamallur kring Jørðina uttan at millumlenda og uttan at taka brennievni á ferðini. Men tað verður ikki hansara fyrsta met. Fyri trimum árum síðani var hann tann fyrsti, sum fleyg kring knøttin í ballón uttan at millumlenda, og í fjør nýtti hann 58 dagar til at sigla kring Jørðina, og tað er met. Hann er eisini tann, sum hevur siglt skjótast í seglbáti tværtur um Atlantshavið.

Steve Fossett sigur, at flogferðin við Virgin Atlantic Global/Flyer fer ætlandi at taka 80 tímar. Tann seinasta ferðin av hesum slagnum var í 1986, men ta ferðina vóru tveir menn í flogfarinum, og ferðin tók meiri enn níggju samdøgur.

# Afghanistan kann enda aftur í ruðuleika

**Á summum økjum eru framstig hend, síðani Taliban-stýrið bleiv koyrt frá, men tað skal lítið til, at landið endar aftur í ruðuleika**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Vøksturin í afghanska búskapinum hevur verið stórur tey seinastu árini, og umleið tríggjar milliónir børn eru sloppin aftur í skúla, efti at Taliban-stýrið bleiv koyrt frá, skrivar menningarstovnurin hjá ST, UNDP, í einari frágreiðing, sum verður almannakunngjørd í dag.

Men so er lítið gott at siga afturat, tí á fleiri økjum er støðan ring. Hagtølini vísa, at fimta hvørt barn doyr, áðrenn tað hevur fylt fimm ár, og at hvønn einasta tíma doyggja tvær kvinnur í sambandi við barnsburð. Meðal livialdurin er bara 44,5 ár ella umleið 20 ár styttri enn í grannalondunum, og einki land í heiminum hevur so mong flóttafólk sum Afghanistan, stendur í frágreiðingini.

UNDP sigur, at eydnast tað ikki at loysa trupulleikarnar í gerandisdegnum, kann Afghanistan enda aftur í ruðuleika. Stovnurin vísir á, at teir ymsu fólkabólkarnir hava framvegis ilt við at samstarva, og at tað kann elva til, at gamlar ósemjur kykna aftur.

## Lítil áhugi fyri grundlóg

Sum tað fyrsta landið hevur Spania gjørt av at taka undir við uppskotinum um eina ES-grundlóg.

Fólkaatkvøða var um spurningin sunudagin, og har atkvøddu 77 prosent fyri uppskotinum. Kortini vísti tað seg, at bara 40 prosent av veljarunum vóru í atkvøðuhølunum, so í veruleikanum atkvøddiu bara umleið ein fjórðingur av veljarunum fyri grundlógini.

Tað var ES-leiðslan í Bruxelles, sum gjørdi av, at tann fyrsta fókaatkvøðan um grundlógina skuldi haldast í Spania, tí har er undirtøkan fyri samveldinum stór. Tí skuldi tað spanska útrslitið eggja øðrum ES-borgarum til at taka somu støðu. Men eygleiðarar siga við AFP, at valluttøkan í Spania var væl minni enn væntað, og at tað kann fáa veljarar í hinum londunum at sita við hús, tá teir skulu atkvøða um grundlógina.

## Skulu flyta í summar

Jødisku niðursetufólkini í Gaza-geiranum kunnu so smátt fara undir at fyrireika seg til at flyta haðani. Sunnudagin samtykti ísraelska stjórnin við seytjan atkvøðum ímóti fimm, at tey 8.300 niðursetufólkini skulu fara úr Gaza-geiranum í seinasta lagi tann 20. juli.

– Eg havi tænt ísraelska ríkinum í 60 ár, og eg havi tikið fleiri hundrað avgerðir. Í fleiri førum hevur tað snúð seg um lív ella deyð, men hendan samyktin er tann truplasta í lívi mínum, segði Ariel Sharon, forsætisráðharri, í einari røðu fyri einum amerikonskum jødafelagsskapi sunnukvøldið. Hann segði, at avgerðin at flyta niðursetufólkini úr Gaza-geiranum og Norðursamária var trupul, men neyðug fyri framtíð Ísraels.

Eftir samtyktini skulu niðursetufólkini flyta úr øllum teimum 21 niðursetubygdunum í Gaza-geiranum ogýra bygdum á Vestara Áarbakka. Í síðstu viku samtykti ísraelska tjóðartingið at rinda niðursetu-fólkunum slakar seks milliardir krónur í endurgjaldi.

Uttan at fáa neyðugu stuðulin til avgerðina, er tað trupult at ímynda sær, at samstarvið millum stjórnina og Umhvørvisflokkin kann halda fram.

## Stjórnin hótt

Fyri trimum mánaðum síðani samdust svenska stjórnin og teir fýra borgarligu flokkarnir um, at sviar skulu ikki á fólkaatkvøðu um ta ætlaðu ES-grundlógina, men at Ríkisdagurin skal taka støðu fyri fólkið.

Umhvørvisflokkurin, sum er stuðulsflokkur hjá stjórnini, var ikki nøgdur við semjuna, og um vikuskiftið hótti flokkurin við at taka stuðulin til stjórnina aftur, verður grundlógaruppskotið ikki lagt út til fólkaatkvøðu. Umhvørvisflokkurin hevur 15 tinglimir, og Gøran Persson, forsætisráðharri, hevur brúk fyri teimum fyri at varðveita meirilutan í Ríkisdegnum.

Í einum skrivi, sum Umhvørvisflokkurin handaði stjórnini sunnudagin, skrivar leiðslan í flokkinum, at tað er skeivt av Sosialdemokratunum og teimum borgarligu flokkunum at taka avgerðarrættin frá veljarunum. Lagt verður afturat, at stendur stjórnin við avgerðina, er tað trupult at ímynda sær, at samstarvið millum stjórnina og Umhvørvisflokkin kann halda fram.

## Nógv ferðafólk í Burma

Hóast fleiri lond hava mælt sínum borgarum frá at fara til Burma ella Myanmar at ferðast, tykist áheitanin ikki virka eftir ætlan.

Orsøkin til, at lond mæla sínum borgarum frá at fara til Burma, er, at hernaðarstýrið har sýtir fyri at virða altjóða mannarættindi, men sambært blaðnum Myanmar Times eru tað ikki øll, sum taka áheitanina til eftirtektar. Blaðið skrivar, at í fjør vitjaðu 660.000 fremmand ferðafólk landið, og tað var tíggju prosent fleiri enn árið fyri. Inntøkurnar frá ferðafólkavinnuni vóru næstan 800 milliónir krónur ella 17 prosent meiri enn í 2003.

So seint sum í síðstu viku mælti bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, bretskum borgarum frá at fara til Burma at ferðast. Fleiri hava víst á, at tey útlendsku ferðafólkini eru við til at fíggja virksemið hjá hernaðarstýrinum, so tað kann verða sitandi.

## Berjast við polio

Afrikonsku londini Nigeria, Niger og Benin hava nú tikið seg saman í einari roynd at gera enda á sjúkuni polio.

Tey trý londini eru tey seinastu, sum hava trupulleikar av polio, og heimsheilsustovnurin WHO sigur, at eydnast tað at basa sjúkuni har, er poliovirusið útruddað. Sjúkan hevur serliga gjørt um seg í Nigeria, og í løtuni eru 63 prosent av øllum poliotilburðunum skrásettir har. Men sambært WHO ber tað til at beina fyri sjúkuni innan árlok.

Sunnudagin hittust nigeriski forsetin, Olusegun Obasanjo, og starvsbróður hansara í Benin, Mathieu Kerakou, á markinum ímillum tey bæði londini, har tey settu tað seinasta átakið ímóti polio í gongd. Málið er at vaksinera 40 milliónir børn ímóti sjúkuni, og meiri enn 130.000 heilsustarvsfólk taka lut í átakinum, skrivar Reuter.